## Obama lovar gjøgnumskygni



Barrack Obama sigur, at hann fer at gera greiðar reglur fyri, hvussu tann næsti hjálparpakkin til fíggjarheimin skal brúkast. Kongressin hevur játtað 700 milliardir dollarar, men enn er bara helmingurin brúktur. Í seinastuni hava fleiri fýlst á, at stjórnin hjá Bush hevur brúkt 350 milliardir dollarar uttan at tryggja sær, hvat pengarnir eru farnir til. Nú lovar Obama størri gjøgnumskygni, tá hansara stjórn fer at brúka tær seinnu 350 milliardirnar. Hann ætlar eisini at brúka ein størri part enn Bush til at forða fyri privatum tvingsilssølum.

## Lupu á norskt skip

Eitt norskt skip varð í nátt álopið úti fyri strondini í vesturafrikanska landinum Nigeria. Sjórænararnir skutu eftir skipinum Viking Forcados stutt eftir klokkan trý í nátt, og tað eydnaðist teimum eisini at taka seg umborð á skipið. Seinni boðaði norska vaktartænastan tó frá, at sjórænararnir vóru farnir av skipinum. Sagt varð, at skipið var á veg út í tryggari sjógv, og at øll manningin hevði tað gott. 52 fólk eru við Viking Forcados, harav nakrir norðmenn. Tað er ikki vanligt, at sjórænarar søkja at skipum við vesturafrikonsku strondina. Tey flestu álopini hava verið í somaliskum sjógvi.

# Nýggja árið – møguleiki at leggja nýggjar lunnar



VINNUKRONIKK

*Signar P. Heinesen*

Sum umstøðurnar hava lagað seg her á landi, eru vit á einum heilt serligum vegamóti í hesum døgum – um vit taka við teim møguleikum, sum bjóðast. Gera vit ikki tað, er hetta bert stundin, sum í ringasta føri kann avgera lagnuna fyri føroysku tjóðina, og sum søgubøkur tí kunnu skriva um, tá ið tann tíðin kemur.

Sum eg haldi meg síggja støðuna liggja tvær møguligar høvuðslinjur fyri framman. Onnur kemur av sær sjálvum, um vit einki gera ella bert fáast við smáputl, betong og tunlar. Hin krevur áræði, evni og ikki minst krevur hon vilja til gott verk.

Tann heimsumfatandi fíggjarkreppan rakar sjálvsagt eisini Føroyar – so ella so. Fær hendan kreppan høvi til at renna saman við tí strategiska kyksendi, sum landið liggur í, kann tað í ringasta føri avtofta Føroyar sum serstaka tjóð, soleiðis sum vit kenna hana seinastu 1000 árini. Tað er onnur linjan.

Um vit hinvegin taka annað skinn um bak, kunnu vit leggja okkum eftir fyrst at "tetta føroysku skútuna" (t.e. fáa tamarhald á almennu funktiónunum) og harnæst at brúka hesar somu læruprosessirnar til at seta í verk burðardyggar strategiskar prosessir til tess at menna føroyska tilverugrundarlagið. Alheims fíggjarkreppan rakar eisini Føroyar, men spurningurin er, um hon rakar so meint, sum aðrastaðni. Ger hon ikki tað, kunnu vit við eini strategiskari menning koma heldur frægari burturúr kreppuni, enn londini kring okkum – okkara strategisku kappingarneytar, sum kappast við okkum um menniskjaliga tærið.

Sjálvur haldi eg, at seinna leiðin er gongd. Høvuðsgrundirnar eru tríggjar. Tann fyrsta grundgevingin er, at eg enn meti, at strategiska kreppan er komin í botn í hesum umfari – hon er í hvussu so er steðgað á.

Tann næsta grundgevingin er, at stór orka liggur bundin í einum bygnaði, sum í praksis er rættiliga einfaldur at loysa upp, um politiskur vilji er til tess. Mín egna meting er, at ein samfelagslig nytta fyri um 500 milliónir kr. árliga kann fáast til høldar innanfyri hetta valskeiðið. Partur av hesi nyttu kann fáa beinleiðis ávirkan á inntøkur ella útreiðslur landskassans rætta vegin.

Tann triðja grundgevingin er, at tað ber til at virka sambært væl skipaðum og royndum arbeiðshættum, sum bæði kunnu samskiftast og lærast, um vilji er til tess.

### Stevnumið í trimum flokkum

Tá ið vit seta mál, ber til at skifta tey í tríggjar flokkar: Rakstur, tillaging undir trýsti og menning. Hetta seinasta nevna vit eisini strategiska leiðslu, tá ið vit í felag, tilvitað og frælst seta okkum mennandi mál.

Sum umstøðurnar eru, uppliva vit eitt trýst, har vit mega tillaga okkum, skulu vit hóra ígjøgnum. Tað verður mangan sagt, at betri møguleikar eru fyri munagóðum broytingum í krepputíðum (tá ið vit noyðast at tillaga okkum undir trýsti). Fyri tey, sum taka avgerðir í praksis, kann tað tykjast lættari at taka "ópopulerar avgerðir". Havast skal tó í huga, at avgerðir eru ikki rættar ella skynsamar, fyri tað um tær eru ópopulerar. Veruleikin er nevniliga tann, at avgerðir tiknar undir trýsti eru sjáldan skynsamar. Rætt og slætt, tí tá er ikki rúm fyri skynsomum avgerðum. Tíðin er ikki til tað. Orkan er ikki til tað. Møguleikarnir eru skerdir. Tí eru væl tær flestu avgerðirnar, sum tiknar eru í krepputíðum, ein sonn plága áratíggju eftir at kreppan er riðin av. At tillagingar undir trýsti ikki seta somu høgu krøv til leiðsluna er nakað annað, og tað kann sjálvsagt vera viðvirkandi til, at veikar leiðslur royna at fyrigykla fólki, at tað er í kreppum, vit leggja botn undir framtíðar loysnum.

Uppgávan er at koma sær úr bráfeingis kreppuni skjótast og effektivast møguligt fyri skjótast til ber at hevja seg upp í strategiskan hugburð og seta sær strategisk mál. Høvuðseyðkennið við eini strategiskari stevnu er, at vit (t.e. flestøll okkara) velja hana av fríum vilja og ikki undir trýsti. Tá ið tað stundum verður sagt, at "tað verður altíð rok, uttan mun til hvat vit gera" er tað eitt rættiliga týðuligt tekin um, at talan er ikki um strategiska leiðslu. Tá ið leiðarar og fólk annars brúka stóran part av orkuni til samskifti og til at grundgeva, meta um, taka ímóti ábendingum og viðgera tær við atliti at stórum óvissum – og tó halda fast í tí skipaða og fleirtáttaða. Tá er okkurt, sum bendir á, at talan er um strategiska leiðslu.

### Kreppan

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, hevur í tíðargrein í Sosialinum beint fyri ársskiftið víst á, at landskassin hevur eitt "strukturelt hall". Sæð frá fíggjarmálaráðnum er hetta ein kjarnutrupulleiki. At hann í somu grein kemur til eina margháttliga niðurstøðu um, hvussu hesin trupulleikin skal loysast við at heinta meira skatt inn broytir ikki tann veruleika, at hetta er fyrstu ferð í 10 ár, at ein fíggjarmálaráðharri kemur til hesa staðfesting.

Eitt "strukturelt hall" verður leiðslutekniskt orðað "funktiónir eru ótálmaðar" (ella "funktioner ude af kontrol" á donskum máli). Um vit í vinnuliga geiranum staðfesta sama trupulleika, siga tey á bankamáli, at vit blaka ikki góðar pengar eftir vánaligum.

Uttan annars at taka støðu til bústaðarskatt ella aðrar tillagingar av skattaskipanini, og uttan mun til, um tað annars er skilagott við skattaumleggingum, er tað altavgerandi, at landskassin ikki fær høvi til at økja um sínar inntøkur, fyrr enn vit kenna okkum rímiliga trygg við, at funktiónirnar eru tálmaðar (í myndatalu, at lekarnir í føroysku skútuni eru tettir).

### Kreppuloysn

Tá ið vit hava staðfest, at landskassin hevur ein bygnaðarligan trupulleika, er bert eitt stað at finna loysnirnar. Hevur tú ein bygnaðartrupulleika finst loysnin í leiðsluskipanini. Tað nyttar lítið at royna at broyta sjálva funktiónina, royna nýggja tøkni, gera roknskaparligar greiningar ("budget-analyser" á donskum máli) ella annað tílíkt. Ein bygnaðarligur trupulleiki kann bert loysast innanfyri karmarnar á leiðsluskipanini, og oftast er veikasta liðið í ovastu leiðsluni. Tað, sum kom ament fram í sambandi við kanningina av heilsuverkinum fyri stuttum, bendi rættiliga greitt á eyðkenni, sum í "fyritøkuarkitekturi" ("Enterprise Architecture" á enskum máli) verður nevnt ein vitanarfella: Tey, sum vita, hava einki at skula sagt, og tey, sum taka avgerðir, vita ikki.

Hetta merkir aftur, at vit kunnu avmarka okkara leitan eftir "problem-eigara" til ein persón. Tað er persónurin aftanfyri løgmansembætið, sum einsamallur - og persónliga – hevur møguleika at átaka sær trupulleikan. Ger hesin persónurin ikki tað, verður trupulleikin ikki loystur.

Spurningurin um, hvør loysnin er, verður ikki nortin í hesi grein. Partvíst er ein møgulig loysn ikki púra óheft av persóninum, sum skal útinna loysnina. Partvíst er ein møgulig loysn nær tengd at teim møguleikum, sum persónurin sjálvur fæst at síggja í tí umhvørvi, viðkomandi ferðast. Tað avgerandi er, at persónurin megnar ikki einsamallur at finna eina loysn – hvørki við ella uttan sínar næstu medarbeiðarar. Vit vita eisini, at talan er um "eina" loysn og ikki eina røð av loysnum. Sæð frá einum leiðslutekniskum sjónarmiði er talan bert um eina "loysn", sum loysir upp fyri eini røð av prosessum, sum tá kunnu tykjast so sjálvsagdar.

### Strategiskar ætlanir frameftir

At ein ætlan er strategisk merkir í stuttum, at vit í felag velja eina framtíð og leggja orku í at røkka hesi framtíð, taka ítøkiligar avgerðir og binda okkum til uppgávuna, hóast avgerðargrundarlagið er veikt, og váðin er stórur. Tað verður mangan nevnt at vera "pro-aktiv" á fremmandum máli.

Mangan hoyrist, at vit mega finna fokusøki. Tað ljóðar so sjálvsagt, men tað hevur ikki nakran sjálvsagdan týdning, tá ið talan er um at leggja ætlanir fyri eitt heilt land. Í einum lítlum, heilum samfelag hava fólk eins skiftandi áhuga og í øðrum størri samfeløgum. Talið á teimum, sum forfylgja sínum stevnumiðjum heilt fram til tað, sum hevur altjóða áhuga, eru fá. Ilt er at gita um, innan hvørji øki hesi fáu vilja leggja sína orku.

Vit kundu ikki leggja eina ætlan fyri 10 árum síðani og tá rokna við, at har kom ein Pál Joensen út í hinum endanum. Veruleikin er tann øvugti. Grundað á sín áhuga og framtakshug brúkti Pál tær umstøður, honum vóru givnar til tað uttasta markið og eitt sindur afturat. Vit skulu eisini leggja til merkis, at

